# Hvat ynskja føroyingar



**Navn: Finn Johannsen**
**Aldur: 56 ár**
**Úr Skopun**

*Setti tú tær nakað nýggjárslyfti í fjør?*
– Nei. Men eg ynskti, at tað fór at ganga mær sjálvum og familjuni væl alt árið.
*Hevur tú nakað nýggjárysnski fyri komandi í ár?*
– Ja, tað verður tað sama. Alt tað fer at ganga familju, børnum og abbabørnum væl.

**Navn: Maibritt Torfinnsdóttir**
**Mørkøre**
**Aldur: 18 ár**
**Havn**



Setti tú tær nakað nýggjárslyfti í fjør?
– Ja, eg setti mær fyri at vera meira sunn.
*Hevur tú hildið tað?*
– Nei, eg havi faktiskt ikki hildið tað so væl...
*Hevur tú nakað nýggjársynski fyri komandi ár?*
– Eg kann ikki koma í tankar um nakað serligt'



**Navn: Ásbjørn Nielsson**
**Nattestad**
**Aldur: 25 ár**
**Havn**

***Setti tú tær nakað nýggjárslyfti í fjør?***
– Nei, ikki nakað generelt. Men so er tað altíð klich'in um, at gerast eitt betri menniskja
***Hevur tú hildið tað?***
– Tað hopi eg, men tað er ringt at svara uppá. Tað mást tú spyrja hini um.
***Hevur tú nakað nýggjársynski fyri komandi ár?***
– Eg havi ikki hugsað um nakað serligt. Nei, haldi faktiskt ikki.

**Navn: Elin Sjúrðardóttir**
**Aldur: 22**
**Hoyvík**



***Setti tú tær nakað nýggjárslyfti í fjør?***
– Ja, at eg skuldi trena meiri, og koma í form
***Hevur tú hildið tað?***
– Nei, eg havi ikki yvirhildið tað
***Hevur tú nakað nýggjársynski fyri komandi ár?***
– Eg vóni at fáa egið firma...



**Navn: *Heidi Norðoy***
***Aldur: 45***
***Havn***

*Setti tú tær nakað nýggjárslyfti í fjør?*
– Nei, eg seti mær sjáldan nakað nýggjárslyfti. Eg seti mær heldur lyfti ígjøgnum árið, soleiðis, tá eg føli, at tað treingir til. Ikki endiliga á nýggjárinum...
*Hevur tú nakað nýggjársynski fyri komandi ár?*
– Eg vóni at fáa eitt gott, róligt og friðarligt ár. Og at øll koma at hava tað gott.



**Navn: Jón Jákupsson Holm**
**Aldur: 23 ár**
**Av Argjum**

***Setti tú tær nakað nýggjárslyfti í fjør?***
– Ja, eg skuldi steðga við at roykja
***Hevur tú hildið tað?***
– Nei, ikki heilt, men tað er batnað. Eg royki ikki so illa, sum eg gjørdi fyrr.
***Hevur tú nakað nýggjársynski fyri komandi ár?***
– Nei, tað haldi eg ikki



**Navn: Hanus Mikal Andreasen**
**Aldur: 16**
**Havn**

***Setti tú tær nakað nýggjárslyfti í fjør?***
– Nei, einki
***Hevur tú nakað nýggjársynski fyri komandi ár?***
– Nei, einki serligt. Eg skal skifta skúla, so eg hopi, at tað fer at ganga væl. Annars einki.